


Í Lønarkunningini kunnu stovnar síggja **royndarkoyring** fyri, hvat verður goldið út í næstu mánaðarligur lønarkoyring. Royndarkoyringin er tøk í tveir dagar, áðrenn lønarkoyringin verður endaliga avgreidd. Endamálið við funkuni er, at stovnurin fær høvi at kanna og rætta lønarflytingarnar, áðrenn tær verða útgoldnar.

Stovnurin kann so, umvegis Lønargreiðsluna, senda Lønarskrivstovuni boð, um okkurt er, sum skal broytast. Tað kann t.d. vera, at eitt starvsfólk er farið úr starvi, men boð eru ikki send at steðga lønini. Talan er um bráboð. Nágreiniligari boð mugu oftast eisini verða send umvegis Lønargreiðsluna seinni.

Stovnurin, t.e. skrásetari og leysgevi, fáa teldupost um, at royndarkoyringin er tøk í Lønargreiðsluni. Royndarkoyringin hvørvur í yvirlitinum, tá ið hon ikki er tøk meiri.

Royndarkoyringin er í kassanum **Minst til**, sum er í ovasta vinstra horni í Lønarkunningini.




Tá ið trýst verður á **Royndarkoyring**, sæst yvirlit yvir tær royndarkoyringarnar, sum eru tøkar. Uttast høgrumegin sæst, nær **seinasta freist** er at senda boð um broytingar.




| Heiti | Frágreiðing | Dagur | Støða | Tøk til/seinasta freist |
|---|---|---|---|---|
| Mðr. Oktober 2022 | Mðr. Oktober 2022 | 26-10-2022 | CALCULATED | mánadagur 24. oktober 2022 12:00 |
| Mánaðarkoyring sep 2022 | Mánaðarkoyring sep 2022 | 26-09-2022 | CALCULATED | týsdagur 25. oktober 2022 12:00 |
| Koyring 1 | testkoyring 1 | 06-09-2022 | CALCULATED | |
| Barsilsendurgjald 2022 - 01-08-2022 (2289... | Barsilsendurgjald 2022 - 01-08-2022 (2289... | 23-08-2022 | CALCULATED | týsdagur 25. oktober 2022 12:00 |
| Pápi barsil. tvey skeið (SC) | Pápi barsil. tvey skeið | 17-08-2022 | CALCULATED | týsdagur 25. oktober 2022 12:00 |
| Roynd juli 2022 | Roynd juli 2022 | 23-07-2022 | CALCULATED | |
| SC test inspect | SC test inspect | 17-06-2022 | CALCULATED | hósdagur 20. oktober 2022 12:00 |
| SC Barils persón test | SC Barils persón test | 20-04-2022 | CALCULATED | |

| Navn | Føðidagur | Upphædd | |
|---|---|---|---|
| | | 42.017,83 | Send boð |
| | | 41.674,36 | Send boð |
| | | 27.442,03 | Send boð |

| Slag | Tekstur | Eind | Satsur | Upphædd |
|---|---|---|---|---|
| 1010 | Føst løn | 1,00000 | 35.018,43 | 35.018,43 |
| 2580 | Gjald til gávukassan | 1,00 | -30,00 | -30,00 |
| 7311 | Eftirlønargjald arbeiðsgevari | 35.018,43 | 13,50 | 4.727,49 |
| 7324 | Tryggingargjald arb.gev | 35.018,43 | 1,50 | 525,28 |

Í yvirlitinum er navn, føðingardagur og upphædd hjá teimum starvsfólkunum, sum eru í royndarkoyringini.

Vinstrumegin navnið á starvsfólkinum ber til at trýsta á ℹ

Handan i'ið goymir seg stovnur, deild, sáttmáli, innplasering, starvsslag, starvsheiti, lønarbrot/vikutímatal og setanarskeið.

Er okkurt, sum ikki er í lagi við lønini hjá onkrum av starvsfólkunum, ber til hjá skrásetaranum at senda Lønarskrivstovuni boð. Tað verður gjørt við at trýsta á ✉ Send boð

Kassin niðanfyri kemur tá til sjóndar, og tað ber til at geva Lønarskrivstovuni boð um, hvat skal verða gjørt við lønina hjá hesum starvsfólkinum.




Í royndarkoyringini ber til at sálda.




Tað verður gjørt í hesum kassanum. Her ber til at sálda eftir stovni/deild, sáttmála ella leita eftir ávísum starvsfólki ella føðingardegi.




Í yvirlitinum ber eisini til at síggja, hvussu lønirnar í royndarkoyringini eru bólkaðar. Tá verður trýst á **Bókingar**, sum stendur beint omanfyri reyða kassan.